# Góðu Tjóðveldiskvinnur - haldið á!

**MAUD WANG HANSEN**
Valevni Tjóðveldis



Eg eri ikki sørt skelkað av úttalilsum hjá Bill Justinussen og Jenis av Rana í løgtinginum í dag.

Hóast eg ikki havi havt stórar vónir um, at vit skuldu verið serliga samd í ávísum málum, so havi eg ongantíð hoyrt so grov, spillandi og beinleiðis diskriminerandi úttalilsi frá tingfólki.

Eg havi fyrr tosað ímóti Jenisi, tá hann langaði út eftir donskum fjølmiðlafólki. Grein 266b.

Eg havi eisini tosað ímóti miðflokkapolitikki, tá hann vil kúga frælsi hjá einstaka menniskjanum. Abortlóggáva.

Í dag vil eg harðliga tosa í móti úttalilsum um, at kvinnur eru skaðiligar fyri føroyskan politikk, og at serliga tjóðveldiskvinnur eru skaðiligar fyri Føroyar.

Kristin trúgv snýr seg um tolsemi og næstakærleika.

Politikkur snýr seg um at skapa frælsar karmar fyri Føroya fólk.

Álit snýr seg um at loyva fólki at ráa yvir sær sjálvum, við virðing og umhugsni fyri sínum medmenniskjum.

At kvinnan í bibliuni bert er ein fjøður í hatti hjá manninum,

At hon ikki skal taka orðið í forsamlingum,

At hon, um hon pyntar seg við smúkkum, er at meta sum skøkja,

- eru eftir mínari meining mannsjavinistiskar tulkingar frá eini tíð, sum vit á ongan hátt kunnu sambera okkum við.

Kvinnur í politikki eru eitt neyðugt og gott tilfeingi fyri Føroya land. Vit hava sæð, at kvinnur ikki ræðast at taka orðið í málum, sum alt ov leingi hava verið tagd burtur. Kvinnur tora at taka avgerð um onnur enn seg sjálvar.

Kvinnur eru við til at varpa ljós á samfelagsviðurskifti, sum leingi hava verið fjald í djúpum tunlum undir betongi og asfalti.

Eg vil heita á formanskapin í tinginum um at taka so grovar ákærur móti tingfólki í fullum álvara og lata tær fáa avleiðingar fyri teir, sum føra tær fram, og at verja tær, sum hetta er vent ímóti.

# Góðu tvøráfólk, góðu veljarar!

**KÁRI SØRENSEN**
Valevni á Tvøroyri



Eg stilli upp til býráðsvalið fyri komandi skeiði.

Ikki er tað tann bjartasta fíggjarliga framtíðin, sum ger, at man roynir seg sum valevni. Nei, hana hava vit so sanniliga sæð betri.

Eg bjóði meg fram, tí eg meti meg verða føran fyri at **gera ein mun**. Gera ein stóran mun, og soleiðis ávirka framtíðina hjá okkum tann **rætta vegin**.

Eg ætli mær ikki at bjóða nøkrum borgara nakað óorealistist valagn, tí sum øllum kunnugt, so er **KRUBBAN TÓM** !!!

Nei, eg ætli mær fyrst og fremst at **FYLLA Í HANA AFTUR**.

Inntøkurnar hjá Tvøroyrar kommunu eru í løtuni í fríum falli.

Framtíðin sær ikki ljós út, sum nú er.

***Tað skal gerast nakað nú!***

Tað skal gerast av fólki við **visiónum**!

Tað skal gerast av fólki við **vilja**!

Tað skal gerast av fólki, sum torir og veit, **hvat skal gerast**!

Eg vil virka fyri, at inntøkurnar hjá kommununi fyri fyrstu ferð í manna minni fara at økjast. Ikki bara økjast, men fara veruliga at síggjast aftur.

Og tá tosi eg ikki um at økja um skattaprosentið.

Tá ið inntøkurnar eru øktar, er gaman í at tosa um íløgur og ábøtur – men ikki fyrr.

Eg vil virka fyri, at vinnan á plássinum aftur fer at blóma.

Eg vil virka fyri, at tey ungu aftur fara at seta búgv í oynni.

Eg vil ikki bara virka - nei, eg gevist ikki, fyrr enn míni mál eru nádd.

Hettar, og nógv meira, tó bert um eg fái tykkara atkvøður.

X við Kára Sørensen tann 11. nov. '08

# Lat okkum skifta orð um Europa-politikkin

**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður



Føroyingar hava ikki havt høvi at skift orð um, hvørja Europa-politiska leið Føroyar skulu fara. Kortini hevur landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum longu tikið avgerðina fyri fólk

Europa-politiska kósin í samgonguskjalinum er røtt.

Tann, sum tímir at ómaka sær at lesa samgonguskjalið, sær, at tvær møguligar leiðir skulu kannast: Møguleikin fyri at gerast partur av EFTA ella at gerast partur av Europasamveldinum. Tá hesir báðir møguleikar eru kannaðir, skal støða takast til, hvørja Europa-politiska leið, vit eiga at halda.

Her skal altso eitt kanningararbeiði fáast frá hondini, áðrenn nøkur støða skal takast.

Kortini er landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum longu farin víðari.

Hóast hvørgin møguleikin er liðugt kannaður, og hóast ongin politisk viðgerð hevur verið av teimum báðum kanningararbeiðunum, ið gerast skulu, hevur landsstýrismaðurin longu tikið støðu.

Aftur og aftur hevur hann greitt almenninginum frá, at hann fer eftir einum EFTA-limaskapi, og so skal roynast eftir teimum 4 frælsunum innan ES.

Hetta er í stríð við samgonguskjalið.

Og í grundini er hetta eisini í stríð við demokratisku siðvenjuna, har borgarar í landinum fáa høvi at skifta orð um henda avgerandi spurning.

**Lat okkum fáa orðaskiftið**

Mín roynd at fáa gongd á eitt Europa-politiskt orðaskifti í Føroyum hevur útloyst eitt ramaskríggj millum summar politikarar.

Onki løgið er í, at teir mest rabiatu limirnir í Tjóðveldisflokkinum beinanvegin leggja persónliga eftir undirritaða og geyla um undirgravandi virksemi. Tey fólkini eru drivin av misskiltari nationalismu og eru von at dyrka ósemjuna og tað, ið skilir okkum.

At toppurin í Fólkaflokkinum ýlir saman við misskiltu nationalistunum, kann undra. Kanska byrjar formansskiftið í tí flokkinum nú at vísa sítt sanna andlit?

Hetta eigur tó ikki at forða føroyingum at fáa eitt orðaskifti í lag um, hvørja Europa-politiska leið land okkara skal fara. Vit mugu tvíhalda um, at orðaskiftið vilja vit hava. Og vit vilja hava tað, áðrenn Jørgin Niclasen og Høgni Hoydal seta í verk avgerðina, teir longu hava tikið yvir høvdið á fólki.

Hetta er ein demokratiskur rættur, sum vit skulu gera krav uppá, tí uttan hann verða vit møguliga førd á eina leið, sum ikki er tann besta fyri land og fólk.

**Hvat siga ymsu bólkarnir?**

Higartil hevur verið merkiliga lítið at hoyrt til teir ymsu samfelagsbólkarnar.

Tað hevði verið áhugavert at frætt, hvat t.d. arbeiðsgevarar halda? Skulu vit royna at práta fornuft við ES, ella er tað EFTA við ella uttan EBS (Europeiska Búskaparliga Samstarvið), ið vit skulu smyrja okkum við?

Hvat siga fakfeløg? Fríur flutningur av arbeiðsmegi gevur stórar møguleikar men sanniliga eisini avbjóðingar her heima.

Hvat siga tær nýggju tænastufyritøkurnar, ið byrja at vinna landinum hart tiltrongdar inntøkur uttaneftir? Hvussu síggja tit framtíðina fyri tykkum á hesum øki?

Eru skúlafólkini uttan meinigar? Tit í granskingarumhvørviðnum? Fíggjarsektorurin? KT-fyritøkurnar?

Hvat halda tit ungu? Tit skulu liva her leingi eftir, at ættarliðið, sum nú ræður, er farið.

Og hvat halda púra vanligir borgarar um spurningin?

Her eru so nógvar strategiskar, fakligar og persónligar diskussiónir, ið mangla, áðrenn støða kann takast til tann stóra spurningin.

**Fjølmiðlarnir mugu vera við**

Nógv munnu vera so evindarliga troytt av, at tað altíð eru vit politikarar, sum skulu standa fremst og sláa hvønannan í høvdið við meiningum, ið ofta eru ov fastlæstar og kategoriskar.

Tí hevði verið fantastiskt, um onnur og klókari høvd enn vit, eisini koma fram við sínum hugsanum og meiningum.

Fjølmiðlar noyðast eisini at spæla við, um vit skulu fáa neyðuga orðaskiftið um Europa-politikkin.

Nógvir journalistar dyrka ta politisku ósemjuna og halda mikrofonunum heldur enn at fara kritiskt inn í substansin í málinum og lýsa tað frá ymsum síðum.

Ósemjan fyri ósemjunnar skyld er óviðkomandi og lítið áhugaverd fyri fólk flest, og tí má hon halda uppat. Sum borgarar og veljarar vilja vit hava tíðindaflutning, sum ger okkum før fyri at taka veruliga støðu.

Tit í almennu fjølmiðlunum hava eina public service-skyldu móti tí samfelag, ið rindar tykkara lønir. Hesa skyldu mugu tit taka í álvara.

Vónandi eru fleiri, sum hava hug at fáa orðaskiftið í lag.

# Ókeypis internet

**LEVI MØRK**



Ja, tað var eg sum var fyrsta valevni, sum kom við hugskotinum, um ókeypis tráðleyst internet til okkum borgarar hjá Tórshavnar kommunu!

**Hotspots/tráðleystinternet, verður nógv kjakast um, inni á www.kjak.org.**

Eg haldi út frá kjakinum inni á kjak.org og facebook, at fleiri valevnir og onnur eru við upp á tankan, við ókeypis tráðleysum interneti og tey halda, at hetta hugskotið er frálíkt. Eisini, tá ið talan er um tað fíggjarliga. Tað hevur kanska verið mest kjakast um tað fíggjarliga við hesum. Eitt annað kjakevni er, um hetta ikki hoyrir heima hjá vinnulívinum.

**Verður goldið við lýsingum frá tí privata vinnulívinum:**

Eg skal siga enn einferð, at tráðleyst internet er vanligt í Danmark eitt nú í Høje Taastrup kommunu har rindar kommunan hotspots tráðleyst ókeypis internet við lýsingum frá tí privata vinnulívinum.

**Tað fíggjarliga og framtíðin:**

Her ber til at fíggja hotspots internet, við lýsingum frá privata vinnulívinum. Eisini ber til hjá Tórshavnar kommuni, at kanna um hotspots møguleikar, um fyrimunur og vansar. Her kan ein venda sær til td. Føroya Tele og Vodafone. Fyri at kanna, hvat ókeypis tráðleys internet er og hvat tað kostar. Soleiðis, at vit kunnu vera í nútíðina og ikki at gloyma inn í framtíðina á KT økinum. Vit eru í dag langt aftan fyri á KT- økinum, enn hinu skandinavisku londini.

**Redspots internet, er meira til tað privat vinnulívið enn hotspots internet:**

Eitt annað er Redspots, tað er internet, sum kann brúkast á gistingarhúsum og aðrastaðni. Har verður so goldið fyri, tá ið tú loggar teg inn. Tað er nakað heilt annað, enn hotspots internet. Her er talan meira um privata vinnu. Ja, fylg við inni á www.kjak.org, ella á facebook, har tit kunnu fylgja kjakinum. Eg kundi eisini ynskt, at har vóru fleiri valevnir, enn eg, Niels Uni Dam og Leivur Hansen. Komið og sigið tykkara meining innan hetta øki.

**Fá nýt stev – vel Lev:**

Fá nýt stev – vel Lev, eisini inn í nútíðina og ikki at gloyma framtíðina.

Vel Levi Mørk, eg eri klárur eru tit?